# 146 *Tit gjørdu mær væl*

## (Matteus 25:34-40)

1. Jesus frøist um seyð, sum nú støðugt legst til
og við hansara brøðrum samstarva vil.
At so seyðurin ger
hesum salvaðu væl,
sær Jesus sum góðgerð, hann samsýna skal.

(*NIÐURLAG*)
*'Tá tit uggaðu teir, tit uggaðu meg.*
*Tað, sum tit gjørdu teimum, gjørdu tit mær.*
*Ein stuðul til teirra var stuðul til mín.*
*Tá tit hjálptu teimum, hjálptu tit mær.*
*Tað, sum tit gjørdu teimum, gjørdu tit mær.'*

2. 'Eg leið tosta og svongd, ja, mær vantaði alt,
men tit komu og styrktu meg, tá tað galt.'
Um tey ovfarin spyrja:
'Nær gjørdu vit tað?'
skal Kongurin svara, og røddin er glað:
(*Niðurlag*)

3. 'Og tit vitnaðu djørv, framdu íðin mítt verk,
mínum brøðrum tit hjálptu, trúføst og sterk.'
Við sín seyð undir høgru lið
sigur hann tá:
'Eitt paradís, lovi eg, tit skulu fá.'
(*Niðurlag*)

(Sí eisini Orðt. 19:17; Matt. 10:40-42; 2 Tim. 1:16, 17.)

*snylpnw*-FR Nr. 146 12/15
© 2016 Watch Tower Bible and Tract Society of Pennsylvania